hvussu er væl.

Tað var ikki frítt fyri, at vit fiskaðu innan fyri mark. Eina ferð, vit høvdu trolið á dekkinum, kom eitt íslendskt verjuskip fram á okkum. Skiparin setti fulla ferð á og verjuskipið aftaná. Teir skutu fleiri ávarðingarskot at fáa okkum at steðgað. Men skiparin latst ikki um vón. Tað eydnaðist íslendska verjuskipinum at fáa okkum aftur og at seta fólk umborð, meðan siglt var í fullari ferð. Tá mátti gamli taka frá. Vit vóru tiknir inn í Oyggjarnar, har skiparin fekk eina bót. Hon var tó ikki so stór, tí trolið var ikki úti, so ólógligur fiskiskapur kundi ikki prógvast.

Bjargingarútgerðin var sera vánalig. Hetta havi eg ikki hugsað um fyrr enn aftaná. Bjargingarbelti fanst ikki. Bjargingarbáturin stóð niðri á dekkinum. Tað er heilt vist, at var brúk fyri tí, so fekst hann ikki út. Her var alt fast, boltar og tað heila.

Vit vóru á Suðurlandinum, tá ið kríggið endaði. Eg væntaði ovfarakæti av teimum. Men tað var so eiðasørt. Teir lótust ikki um vón. Hetta er mótsatt av tí, sum føroyingar upplivdu, tá ið teir vóru í Aberdeen, tá kríggið varð avblást. Tað var rættuligur veitslurómur.

## Systkini

Um systkini annars kann sigast, at Tórálvur fór fyrst yvir til Noregs og síðan til Svøríki, har hann býr nú. Hann er verkfrøðingur og hevur arbeitt í nógvum londum. Hann fór yvir til Harry Fonsdal at arbeiða við elektrisitet. Ein av teimum, sum eisini fóru tá var Heini Olsen, sum eisini hevur arbeitt víða um heimin.

Tað, sum Trygvi hevur verið til sjós er, at hann hevur róð út í Grønlandi. Gunnar hevur verið nógv til sjós. Hann hevur eisini siglt saman við Røkke í Noregi.

Ingibjørg giftist ikki, men fekk eina dóttir, sum býr niðri. Hon doyði av einum ferðsluóhappi í Vestmanna.

Brynhild giftist til Vágs, og hon doyði eisini av eini ferðsluvanlukku.

Sverri var til skips sum aðrir menn. Kristoffer arbeiddi í nógv ár hjá landsverkfrøðinginum.

Vit takka Steingrim fyri hansara sera áhugaverdu frágreiðing, sum er ein sera góð lýsing av, hvussu tað bar til at koma undan hóast slíkar vanlukkur sum hesar í 1934.



*Gunnar, sonur Óla Jákup, hevur siglt saman við Røkke t.h.*

# Aðrar vanlukkur

**Vestmanna hevur verið rakt av fleiri skipavanlukkum undan Neptun. Tær sum hava kostað flest mannalív munnu vera Rutland og Dora og skulu tær nevnast her:**

## Ruthland

Jóan Magnus á Válinum keypti Rutland i 1912. Hann førdi hana til hon gekk burtur í 1916.
Skipið kom framvið Langanes 12. september og hvarv uttan nakra slóð. Menn vita, at tað var illveður miðjan september.
Menninir sum fórust vóru:

Jóan Magnus Olsen, skipari 38 ár,
Jákup Johannes Johannesen, 20 ár
Ívar Sigurd Hummeland, 17 ár
Hans Martin Petersen, 54 ár
Tummas Egholm, 59 ár
Jóan Pauli Haldansen, 21 ár
**Vestmanna**

Jóhannes Nielsen, bestimaður, 27 ár
Ívar Soliman Olsen, 26 ár,
**Válur**

Dánjal Magnussen, 21 ár
Jákup Mathias Nielsen, 20 ár
Adolf Jákup Nielsen, 25 ár
Magnus Hansen, 18 ár
Hans Jacob Óli Danielsen, 18 ár
**Kvívík**

Johannes Mathias Heinesen, 19 ár
Tummas Heinesen, 19 ár
**Mykines**

## Dora

Dora gekk burtur í 1931. Hon var seinast sædd av Fram tann 18. september. Aftaná var eitt rættuligt ódnarveður. Tá ið teir vóru saknaðir fór Seagull tann 19. oktober av Vestmanna til Íslands at leita eftir henni, men teir komu heim aftur uttan úrslit.

**Við Doru fórust:**
Jákup Martin Egholm, flaggskipari, f. 6.11.1893, Hvalvík
Magnus Ditlev Olsen, fiskiskipari, 2.10 1907, Vestmanna
Hans Poulsen, 1. Bestimaður, f. 15.7. 1885, Eiði
Tummas Sigurd Olsen, 2.bestimaður, f. 23.11. 1907, Vestmanna
Hans M. Jacobsen, kokkur, f. 17.2. 1902, Slættanes
Jákup Martin Olsen, f. 7. 8. 1910 Vík
Dánjal Petur Olsen, f. 19.10 1912, Vík
Jákup Emil Olsen, f. 13.9.1914, Vestmanna
Kristian Magnus Egholm, f. 30.9. 1913, Streymnes
Ragnvald Hansen, f. 14.5. 1912, Leynar
Sámal Elias Samuelsen, f. 4.1. 1895, Kollafjørð
Jóhan Egholm, f. 2.6. 1908, Streymnes
Magnus Pauli Poulsen, f. 2.1. 1916, Eiði
Meinert Sommer Olsen, f. 30. 7. 1916, Vík
Jógvan Poulsen, 6.3. 1883, Vík
Viggo Christiansen, f. 2.9. 1914, Kvívík
Hjalgrim Dahl, f. 8.9 1916, Oyri

Her vóru sum so mangan nógvir serligir sorgarleikir. Kristian Magnus og Johan Egholm vóru brøður. Árið fyri var beiggi teirra Hans Jacob deyður í maskinrúminum á Slatrinum. Teir høvdu verið fimm brøður, og nú var eingin eftir. Søgan hjá teimum hevur verið umrødd í røðini Hendur ið Sleptu.




*Dora helst í 1923. Aftastur sitandi í lúnningini er skiparin Poul Christoffersen. Triði fremstur er beiggi hansara Elias. Báðir brøður Óla Jákup. Sum tað sæst er nógvir av beiggjunum sjómenn*



*Magnus Ditlev Olsen var fiskiskipari á Doru*



*Jóan Magnus Olsen var skipari á Ruthland*

**Komandi partur**
**Í komandi parti verða frásagnir frá avvarðandi hjá monnum, sum fórust við Nólsoy, millum annað um teir báðar brøðurnar sum doyðu frá 21 børnum**

Sosialurin